# Livdi 20 ár í jungluni



Tvey ár eftir, at hon skapti eina sensatión, er 28 ára gamla kambodianska ”junglugentan”, sum hevði verið burtur í sløk 20 ár, so smátt byrjað at tosa. Tað var í 2007, at unga kvinnan varð funnin skitin, nakin og svong, tá hon royndi at stjala mat frá einum bónda. Hon dugdi ikki at tosa, men kundi bara siga ljóð, sum hoyra dýraheiminum til. Søgan um Rochom P'ngieng, sum hon verður rópt, fór um allan heim. Fyri 20 árum síðan rýmdi hon heimanífrá, og øll hesi ár hevði eingin sæð gentuna. - Nú dugir hon at biðja um mat, vatn og onnur smáting, tá hon er svong, sigur pápi hennara, Sal Lou. Spurnartekin hevur verið sett við, um søgan um junglugentuna veruliga er sonn. Onkur arr, sum gentan hevði, vórðu hildin kanska at benda á, at hon hevði verið fangi og heldur ikki varð hildið, at húðin undir føtrunum bendi á, at hon hevði livað í jungluni. Løgreglumaðurin Sal Lou hevur sagt, at gentan er hansara dóttir, sum hevur verið burtur í næstan 20 ár. Hann skal kenna hana aftur av einum arri á høgra armi, ið hon fekk sum smágenta, tá hon spældi við ein knív. Hvørki Sal Lou ella kona hansara hava latið seg DNA-kannað fyri at prógva, at Rochom P'ngieng er dóttir teirra.

# Annika onga viðmerking

**Ætlanarskrivið er ikki alment atkomiligt – í hvussu er ikki enn – og í løtuni havi eg onga viðmerking til tað ítøkiliga í skrivinum, sigur Annika Mittún Jacobsen, kringvarpsstjóri**

ÆTLANARSKRIV

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Annika Mittún Jacobsen hevur onga viðmerking til ætlanarskrivið, sum hon hevur handað Jón Brian Hvidtfeldt, tíðindaleiðara í Kringvarpinum*

Stóru tíðindini í gjár – alla aðra staðni enn í Kringvarpinum – vóru, at tíðindaleiðarin, Jón Brian Hvidtfeldt, hevði fingið ætlanarskriv frá stjóranum, Anniku Mittún Jacobsen.

Tíðindaleiðarin varð samstundis fyribils settur frá starvi sínum, og um vikuskiftið boðaði Annika Mittún Jacobsen frá, at Ingi Rasmussen við tænastuboðum er settur sum virkandi tíðindaleiðari.

Kringvarpsstjórin sigur í ætlanarskrivinum, at orsøkirnar til skrivið eru eitt nú samstarvstrupulleikar, ovurnýtsla av peningi í triðja ársfjórðingi, og harav mist álit á tíðindaleiðaran.

Annika Mittún Jacobsen hevur tó onga viðmerking, hvørki til samstarvs trupulleikarnar ella til støddina av ovurnýtsluni av pengum.

–Talan er um eitt persónsmál, og eg havi ongan hug til at gera nakra viðmerking til málið í løtuni, sigur Annika Mittún Jacobsen.

Í gjár kom eisini fram, at 17 av starvsfólkunum á tíðindadeildini hava skrivað undir eitt skriv, har tey mótmæla, at Jón Brian Hvidtfeldt hevur fingið ætlanarskrivið sum er forleyparin til endaligu uppsøgnina sum tíðindaleiðari.

Men heldur ikki um tað vil kringvarpsstjórin úttala seg.

– Eg eri fegin um, at Jón Brian Hvidtfeldt fær stuðul, men eg havi framvegis onga viðmerking, heldur ikki til tað, sigur Annika Mittún Jacobsen.

Sum nevnt í Sosialinum í gjár hevur Jón Brian Hvidtfeldt fyribils valt at mótmæla ætlanarskrivinum, og hann hevur 14 daga freist at svara endaliga frá 29. desember at rokna.

Verður hildið fast um ætlanarskrivið og uppsøgnina sum tíðindaleiðari, stendur framvegis Jón Brian Hvidtfeldt í boði at halda fram sum vanligur tíðindamaður.

# Fær stuðul frá starvsfeløgunum

**Starvsfelagarnir í kringvarpinum hjá Jón Brian Hvidtfeldt krevja, at ætlaða uppsøgnin verður tikin aftur**

UPPSØGN

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Starvsfólkini í kringvarpinum finna seg ikki í, at stjórin vil av við Jón Brian Hvidsfeldt sum tíðindaleiðara.

17 starvsfólk á tíðindadeildini hava sent kringstjóranum Anniku Mittún Jacobsen eitt mótmælisskriv

Tey siga seg hava fult álit á, at Jón Brian Hvidtfeldt hevur røkt sínar uppgávur eftir teimum umstøðum, hann hevur havt at arbeiða undir. Tey halda eisini, at Jón Brian Hvidtfeldt er sera væl fakliga fyri at røkta starvið sum tíðindaleiðari.

Starvsfelagarnir vísa á, at tíðindadeildin hevur havt alt ov lítla játtan til at røkja sínar skyldur, og tey krevja, at ætlaða uppsøgnin verður tikin aftur.

Tey hava eisini biðið um fund við stjóran um hetta málið, og henda fundin vilja tey hava í seinasta lagi í morgin.

Tey sum hava undirskrivað mótmælið eru Leivur Frederiksen, Dánjal Højgaard, Ingolf S. Olsen, Johnsigurd Johannesen, Óluva Zachariasen, Elin Winther Poulsen, Ingi Rasmussen, Sigmar Bláberg, Rúni F. Kjær, Herluf Sørensen, Høgni í Jákupsstovu, Karolina Thostrup, Dia Midjord, Kaj Joensen, Jógvan Hugo Gardar, Jóhann Mortensen og Sigrún H. Brend.



*Jón Brian Hvidsfeldt*